FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 18. mai 2021
J. nr.: 21/07295-2

Svar uppá fyrispurning nr. 137/2020 frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, settur, Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um útlendska arbeiðsmegi í Føroyum.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Gjalda útlendingar, sum arbeiða í Føroyum fyri útlendskar fyritøkur, skatt í Føroyum?
2. Gjalda útlendingar, sum eru leigaðir av útlendskari fyritøku, sum samstarvar við føroyska fyritøku, og gera arbeiðið í Føroyum, skatt í Føroyum?
3. Líkjast skattareglurnar í Føroyum reglunum í hinum Norðurlondunum?

Svar:

Til nr. 1
Útlendingar, sum arbeiða í Føroyum fyri útlendskar fyritøkur, rinda eftir skattareglunum skatt í Føroyum. Avgerandi fyri skattskylduna er ikki, um arbeiðsgevarin er føroysk ella útlendsk fyritøka. Avgerandi fyri skattskylduna er hinvegin, um arbeiðið verður gjørt í Føroyum ella ikki.

Niðanfyri eru reglurnar um avmarkaða og fulla skattskyldu til Føroyar lýstar í stuttum.

Persónar, sum arbeiða eitt stutt tíðarskeið í Føroyum uttan at flyta bústað, skulu søkja um fyribils p-tal fyri at fáa løn útgoldna. Eitt stutt tíðarskeið er 180 dagar ella minni í eitt 12 mánaðar tíðarskeið.

Persónar, sum hava inntøku í Føroyum uttan at búgva her í einum tíðarskeiði, sum er 180 dagar ella minni eitt 12 mánaðar tíðarskeið, eru avmarkað skattskyldugir. At vera avmarkað skattskyldugur merkir, at persónurin rindar skatt í Føroyum av inntøkuni her, men er annars skattskyldugur í heimlandinum. Inntøka kann vera løn, ágóðar, eftirløn ella samsýning fyri arbeiði, sum gjørt er í Føroyum.

Persónar, sum eru avmarkað skattskyldugir, rinda 42% í skatti. Teir, sum eru við FAS-skipum og bareboat-skipum, rinda tó 35%. Avmarkað skattskyldug fáa ikki barnafrádrátt og rentustuðul í Føroyum.

Eitt longri tíðarskeið er meira enn 180 dagar í einum 12 mánaðar tíðarskeiði. Eru persónar so leingi í Føroyum, eru teir fult skattskyldugur her. Hetta merkir, at skattskylduga inntøkan í Føroyum og tað, sum er forvunnið aðrastaðni, skal gevast upp til skattingar í Føroyum frá tí degi, persónurin er komin til landið. Arbeiðir ein eitt longri tíðarskeið í Føroyum, skal ein flyta bústað higar.

Víst verður eisini til hesa leinkjuna á heimasíðuni hjá TAKS:
https://www.taks.fo/fo/borgari/bolkar/utlendingar-id-koma-til-foroya-at-arbeida/.

Somuleiðis verður víst til skjalið *Moving to the Faroe Islands for work* frá TAKS, sum kann takast niður á hesari síðuni: https://taks.cdn.fo/media/2353/moving-to-the-faroes-for-work.pdf?s=rokWvTpccxTyJtqm36Ae1dEJBPo

Til nr. 2
Útlendingar, sum eru leigaðir av útlendskari fyritøku, sum samstarvar við føroyska fyritøku, og gera arbeiðið í Føroyum rinda eftir skattareglunum skatt í Føroyum. Avgerandi fyri skattskylduna er ikki, um talan er um útlendingar, sum eru leigaðir av útlendskari fyritøku, sum samstarvar við føroyska fyritøku. Avgerandi fyri skattskylduna er hinvegin, um arbeiðið verður gjørt í Føroyum ella ikki.

Sí eisini svarið til nr. 1, sum eisini svarar hesum spurninginum.

Til nr. 3
Skattareglurnar í Føroyum líkjast reglunum í hinum Norðurlondunum.

Norðurlendski tvískattasáttmálin er galdandi millum Norðurlondini, Føroyar, Danmark, Finnland, Ísland, Noregi og Svøríki. Norðurlendski tvískattasáttmálin er frá 21. september 1996 og er lýstur við lógtingslóg nr. 122 frá 22. desember 2008. Í dagliga arbeiðinum við skattaspurningum um tvískatting verður norðurlendski sáttmálin mest nýttur.

Tvískatting er, tá ið persónar rinda skatt av somu upphædd tvær ferðir. Tað kann koma fyri, tá ið ein arbeiðir í einum landi og býr í øðrum, og bæði lond krevja skatt av inntøkuni. Fyri at sleppa undan hesum, kunnu lond gera eina linking í egnari skattalóg, ella tey gera tvískattasáttmála og avtala, hvat land skal hava skattin. Í viðurskiftum við lond, sum Føroyar ikki hava tvískattasáttmála við, verður linking givin eftir reglum í føroysku lóggávuni. Føroyar hava linkingarásetingar í § 154 í skattalógini og í § 19 í kapitalvinningsskattalógini.

Víst verður eisini á hesa leinkjuna á heimasíðuni hjá TAKS um tvískatting: https://www.taks.fo/fo/borgari/skattur/tviskatting/.

Somuleiðis verður víst til bls. 217-239 í Vegleiðingarskrivinum frá TAKS, sum snúgva seg um Norðurlendska tvískattasáttmálan. Vegleiðingarskrivið kann takast niður á hesari leinkjuni: https://www.taks.fo/media/1107/vls-2015.pdf.

Tinganes, 18. mai 2021

Jørgen Niclasen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum